# Sosialurin

Nr 223 leygardagur • 17. november 2001 • 75. árgangur • Kr. 12,00

www.sosialurin.fo




Kinesiski matstovueigarin í Havn:

Revsaður fyri at flenna at Mao

Vikuskiftið síða 4

# Amerada funnið olju



**OLJULEITING**

*Jan Müller*

Amerada Hess hevur funnið olju á landgrunninum. Vælvitandi keldur í oljuídnaðinum í Aberdeen vilja vera við, at Sovereign Explorer hevur funnið kolvetni, gasskondensat, og eisini olju í botnpartinum av brunninum, á umleið 4200 metra dýpi. Amerada skal fyrst hava rakt við gass, men síðani eisini fingið sannførandi prógv um "crude", tvs. ráolju heldur enn bert oljuspor. Hinvegin ber ikki til at siga, um talan er um eitt veruligt oljufund við rakstrarverdugum nøgdum. Tað skulu víðari kanningar til fyri at staðfesta, hvat slag av fundi talan er um og hvussu stórt tað er. Oljumálastýrið fer helst at koma við tíðindunum um úrslitið av oljuboringini mánadagin. Tað er ikki eydnast Sosialinum at fáa tíðindini váttað frá Amerada Hess ella Oljumálastýrinum. **Lesið meira um málið týsdagin.**



Barsilsskipanin:

Riggar bert í lívsvanda

síða 11



Portørverkfallið:

Læknar rudda

síða 4



Sivik frá KÍ til Jordan

Ítróttur s. 31













